

*10 føroyskir tónleikarir luttóku á sangskeiðnum hjá Sigrið Sivertsen og Onnu Katrinu Petersen*

# Øðrvísi sangskeið

**Seinastu dagarnar hava Sigrið Sivertsen og Anna Katrina Petersen skipað fyri einum sangskeiði, har tær hava lært frá sær ein serligan sangteknikk, ið kallast »Complete Vocal Technique«. Tveir lærarar frá størsta sangskúlanum í Evropa luttóku á skeiðnum, har bert 10 útvaldir føroyskir tónleikarir sluppu at luttaka**



*Ein lærari frá størsta sangskúlanum í Evropa, Complete Vocal Institute, lærir Jens Marna Hansen at syngja í ymsum munnstøðum*

TÓNLEIKUR

*Bjørk K. Olsen*
*bjork@sosialurin.fo*

Seinastu vikuna hava Sigrið Sivertsen og Anna Katrina Petersen skipað fyri einum sangskeiði á Tórshavnar Musikkskúla. Tveir lærarir frá Complete Vocal Institute í Keypmannahavn, ið er størsti sangskúli í Evropa, hava lært frá sær teir seinastu fimm dagarnar. Hesin stovnurin ferðast runt ymsa staðni at læra frá sær ein serligan sangteknikk og gera hetta nú í Føroyum. Complete vocal technique, eitur teknikkurin, teir 10 tónleikararnir, ið eru við á skeiðnum, læra. Tær báðar, Sigrið Sivertsen og Anna katrina Petersen, hava fingist nógv við hesum serliga sangteknikkinum, ið kann nýtast til allar sjangrur innan tónleik.

### Skeiðið

Tónleikararnir verða undirvístir í einar átta intensivar tímar hvønn dag í fimm dagar. Bert 10 tónleikarir sleppa at luttaka á skeiðnum, greiðir Sigrið Sivertsen frá, og tí tordu tey ikki at lýsa almennt við skeiðnum. Skeiðið er á einum ávísum støði, og tí kunnu øll ikki luttaka. Sigrið Sivertsen hevur spurt um seg, fyri at fáa tónleikarar, ið eru á einum nóg høgum støði. Teir tónleikararnir, Sigrið Sivertsen og Anna Katrina Petersen, ivaðust í, hava sent eina demofløgu niður til sangstovnin í Keypmannahavn, har tey síðan hava mett, um teir eru á nóg høgum støði.

### Tónleikararnir

Fleiri teirra, ið luttóku, eru sera vand innan tónleikheimin í Føroyum. Millum annað luttóku Karl Martin Samuelsen, ið er kendur frá bólkinum Hjarnar, og Jóannes Lamhauge, ið eigur sangin »Púra vekk«, ið hevur verið spældur javnan í útvarpinum seinastu tíðina.

- Tað er ikki ætlanin at taka fólk inn og skapa ein tónleikara, sigur Sigrið Sivertsen. Tónleikararnir koma hagar og greiða frá, hvat tey vilja hava og duga, og tað er hetta, vit skulu hjálpa teimum við. Tey hava tó eisini roynt ymiskar sjangrur, tey ikki eru von við, á skeiðnum.

- Millum annað hevur ein genta, ið vanliga syngur klassiskt og milt, sungið ein rokksang við einum overdrivi, ið er rokkkent, og hetta vísti seg at rigga sera væl.

Á skeiðnum spældi Jóannes Andreasen undir, men summi høvdu egin ljóðføri við at venja sangir, tey sjálvi høvdu skrivað.

Sunnudagin endaði skeiðið við einari konsert í listaskálanum, har tey sungu ein sang hvør og síðan eitt felagsnummar, tey høvdu vant alla vikuna.

Teir 10 føroysku tónleikararnar, ið luttóku á sangskeiðnum:

Karl Martin Samuelsen
Jens Marni Hansen
Katrina Petersen
Jóannes Lamhauge
Sigrið Sivertsen
Fríði Bjørgvin
Lovinda Helgaklett
Tórfríð Tavsen
Kristina Hansen
Doris Helena Olsen